## Køhlert hómar framgongd

Brøndby tapti aftur í superliguni um vikuskiftið, og hesaferð noyddust teir gulu at lúta fyri arvafíggindunum í FCK, men hóast tapið, sá Brøndby-venjarin glottar fyri framman. - Eg eri ikki nøgdur við at tapa, men eg síggi framgongd í okkara spæli. Vit klára okkum væl í hesum dystinum, men FCK klára at vinna 1-0, segði Tom Køhlert eftir tapið. Brøndby hevur bert vunnið ein av 10 dystum í superliguni higartil, og liðið liggur í botninum í deildini.



## Troyttir FCK-spælarar

Hóast tað eydnaðist FC Keypmannhavn at vinna dystin ímóti Brøndby í superliguni 1-0, var venjarin hjá FCK ikki heilt nøgdur við avrikið. - Tað er sjáldan, at eg havi sæð so nógvar av okkara spælarar spæla illa. Fleiri av spælarunum tykjast sera tungir, eftir at teir hava verið úti við landsliðum, segði Ståle Solbakken eftir dystin. Hann ætlar sær at spara onkrar av teimum troyttu spælarunum í komandi dystum.

# Hava betri vónir enn í fjør

**Hoyvíkingar hava eitt bæði ungt og spennandi lið í bestu mansdeildini í hondbólti, og Poul Kjartan Dam sigur eisini, at teir hava hampiligar vónir til komandi kappingarár. – Allir eru eitt ár eldri nú, og tað er heilt víst, at vit hava betri vónir í ár, enn vit høvdu í fjør**



*- Allir spælararnir eru blivnir eitt ár eldri, so rutinan er eitt sindur størri á liðnum. Eg haldi eisini, at vónirnar eru nógv størri í ár enn tær vóru í fjør. Hetta sigur ungir høgri bakkurin hjá H71, Poul Kjartan Dam*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

H71 er eitt av teimum liðunum í bestu mansdeildini í hondbólti, sum oftast hevur livað eina tilveru í niðara endanum av stigatalvuni. Hoyvíkingar hava tó okkurt árið verið við heilt uppi í toppinum, tí fyri bert trimum árum síðani var tað leingi líkt til, at teir skuldu vera annað liðið, sum skuldi spæla í finaluni um meistaraheitið.

Árið í fjør var tó einki undantak í so máta, tí liðið endaði á aftasta plássi. Hetta var tó als ikki nakað óvæntað úrslit fyri nakran, og kanska serliga ikki fyri hoyvíkingar sjálvar, tí ætlanin hjá H71 var púra greið. Felagið ætlaði at geva teimum ungu spælarunum møguleikan á besta liðnum, og hetta tekur altíð sína tíð. Ungu spælararnir vístu tó í fleiri dystum bæði dirvi, áhaldni og sera gott hondbóltsspæl, og hetta gjørdi eisini, at teir í fleiri umførum lupu hvøkk á liðini, sum lógu og bardust í toppinum.

Í ár eru spælararnir blivnir eitt ár eldri og eitt ár royndari, og felagið hevur eisini fingið nýggjar venjarar. Her er talan um nú fyrverandi landsliðsvenjararnar, Kára Nielsen og Birgir Hansen, og spennandi verður at síggja, hvat hesir fara at fáa burtur úr ungu hoyvíkingunum.

Sosialurin hevur tikið eitt prát við ein av ungu spælarunum hjá H71, Poul Kjartan Dam, har vit m.a. hava spurgt hann um hansara vónir fyri kappingarárið, sum liggur fyri framman.

### Hørð venjing

Eitt av eyðkennunum hjá unga H71-liðnum hevur verið teirra skjótu spæl og teirra sera skjótu mótálop, og hetta kunnu vit uttan iva vænta at síggja aftur komandi kappingarár. Tí Poul Kjartan sigur, at liðið hevur vant sera hart upp undir kappingarárið.

- Ja, vit byrjaðu at venja eina ferð í summar, og síðani tá hava vit koyrt hart alla tíðina. Eg trúgvi ikki, at spælararnir nakrantíð hava verið so væl fyri fyrr, so hetta verður spennandi, sigur sterki høgri bakkurin.

### Fleiri spælarar við aftur

Síðsta árið vóru vónirnar ikki serliga stórar til H71-liðið, tí fleiri av spælarunum vóru blaðungir og royndu seg fyri fyrstu ferð í bestu deildini. Úrslitini vóru tó ikki heilt av vegnum, og Poul Kjartan dylur ikki fyri, at vónirnar eru heldur betri í ár.

- Allir spælararnir eru blivnir eitt ár eldri, so rutinan er eitt sindur størri á liðnum. Eg haldi eisini, at vónirnar eru nógv størri í ár enn tær vóru í fjør. Tað er ringt at geva nakað boð um, hvar vit fara at enda, so eg haldi, at vit taka bara ein dyst á gangin, og so fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur.

Tað eru tó fleiri av eldru leikarunum í felagnum, sum eru byrjaðir aftur, og hetta kann uttan iva vera til teirra fyrimun.

- Halgir er byrjaður aftur at spæla í ár, men tað er tó enn sera ivasamt, hvussu nógv hann verður við. Harafturat er Jens Skipagøta í málinum byrjaður aftur, og Eyðun Højgaard, sum vanliga spælir høgri vongur, er eisini komin heim aftur úr Danmark. Hetta er sjálvandi got fyri breiddina á liðnum, og hetta styrkir heilt sikkurt um hópin hjá okkum í ár, sigur Poul Kjartan.

### Skjótleikin er styrkin

Poul Kjartan ivaðist slett ikki, tá vit spurdu hann, hvat hann metti vera sterkastu síðuna hjá liðnum.

- Sterkasti síðurnar hjá okkum mugu vera skjóta spælið og mótálopini. Vit spæla ótrúliga skjótan hondbólt, og hetta ger tað ofta trupult hjá hinum liðunum. Harafturat eru vit sera skjótir í mótálopunum, og tað eru eisini nógvir spælarar, sum renna mótálop hjá okkum, so hetta má eisini metast sum ein stór styrki.

Hann helt tó eisini, at liðið hevði ávísar vansar.

- Fyrst og fremst mangla vit nakað av rutina, tí vit hava so øgiliga nógvar ungar leikarar. Harafturat haldi eg, at vit kanska eru lægri enn hini liðini – serliga tá Halgir ikki er við - og hetta kann jú eisini vera ein trupulleiki í hondbólti, metir Poul Kjartan.

Annars er ver at leggja afturat, at hoyvíkingar hava fingið eitt nýtt venjarapar til komandi kappingarár. Her er talan um nú fyrrverandi landsliðsvenjararnar, Kára Nielsen og Birgir Hansen, og Poul Kjartan sigur seg vera sera væl nøgdan við nýggju venjararnar.

- Venjararnir eru toppseriøsir, og hetta er týdningarmikið fyri okkum. Eg haldi eisini, at vit hava roynt nógv í venjing í ár, sum vit ikki hava royndt áður, og hetta ger alt sera spennandi. Eg haldi eisini, at hesir eru teir røttu menninir til okkum, og at teir veruliga kunnu lyfta liðið, sigur Poul Kjartan at enda.

Hvussu verður og ikki hjá H71 fáa vit at síggja, tá landskappingin endar í mars mánaði. Eingin ivi er tó um, at tað verður spennandi at fylgja ungu hoyvíkingunum í kappingarárinum, sum liggur fyri framman.

## Gamlir garpar aftur í eldin

Fleiri av royndu leikarunum, sum ikki vóru við H71 í fjør, vera aftur at síggja í hópinum í ár. Halgir Dahl-Olesen, sum hevur havt stórar trupulleikar við knøunum, verður partur av hópinum í ár, men tað er tó ivasamt, hvussu nógv stórskjúttin fer at spæla. Harafturat fer Jens Skipagøta at taka kappingina up við Levi Nybo í málinum. Eisini Eyðun Højgaard, sum hevur verið búsitandi í Danmark, er komin heim aftur, og hann verður helst at síggja á høgra vongi hjá hoyvíkingum. Hesir tríggir kunnu allir geva liðnum eitt sindur av tí rutinuni, sum ungu spælararnir helst manglaðu í fjør.



## Landsliðsvenjarar í H71

Fyrrverandi føroysku landsliðsvenjararnir í hondbólti, Kári Nielsen og Birgir Hansen, hava skift tilveruna sum landsliðsvenjarar út við eina tilveru sum venjarar hjá H71 í Atlantic Airways deildini. Kári og Birgir hava fyrr staðið á odda fyri Kyndli við sera góðum úrslitum, og tí verður spennandi at síggja, hvussu góð úrslitini vera við unga H71-liðnum. Í fjør gekst ikki so væl hjá H71, sum endaði aftast í bestu mansdeildini, men unga liðið hevur tó í fleiri umførum víst, at teir kunnu gera seg galdandi, og tí verður uppgávan hjá Kára og Birgir bæði stór og spennandi.